# SVARTA STRÍ VIÐ GULA BAN

**HEIMURIN** ER IKKI **SVARTUR OG HVÍTUR**. HETTA VILDI HIN UNGA **DANSARINNAN JOSEPHINE BAKER** PRÓGVA, TÁ HON VIÐ **NAKINDANSI** OG ØÐRUM **ÓSØMILIGHEITUM** SKAPTI **ØSING** OG KJAK Í **VESTURHEIMINUM** Í 20'UNUM OG FRAM



DANSARINNA
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Á pallinum dansar ein ung og vøkur svørt genta hulabanduladans til bongojazz. Við víðopnum, argandi eygum og sleiktum dreingjahári. Hon er nakin, og um lendarnar hongur eitt bast við gulum bananum og darlar til rútmisku rørslurnar. Og fólk eru á gosi.

Árið er 1926 og staðið er París. Og hetta er kollveltandi og óhoyrt, tí hon er kvinna og svørt og nakin. Men tíbetur í París og ikki í heimlandi hennara USA, har skilnaðurin millum rasurnar er so hjølfestur, at nakni banandansurin hevði ikki gingið ann. Har, eins og í Europa skapar hon øsing í meirilutans trongu heimsfatan. Men, í Europa, verður hon eisini móttikin við opnum ørmum, sum eitt eksotiskt natúrbarn, eitt dekadent listarligt innslag í mentanarradikala umhvørvinum. Í einum tíðarskeiði við »funkis, frísinni og fascismu«, sum onkur hevur nevnt hetta spennandi rembingartíðarskeiðið millum kríggini bæði.

## Onki er svart og hvítt

Søgan um Josephine Baker er søgan um ungu, svørtu dansarinnuna, sum ikki vildi góðtaka, at heimurin var svartur og hvítur. Hvørki tá umráddi rasu, sexualitet ella kyn. Við Gudsgivnu dansi- og sanggávum sínum gekk hon sínar egnu og øðrvísi leiðir í stríðnum fyri javnrættindum millum menniskju, og kom á hendan hátt á tal við allan tann modernaða heimin.

Fødd og uppvaksin í Missouri í USA. Mamman svørt, pápin hvítur, men ókendur. Í heimlandinum var fíggjarligur ótryggleika, rúsdrekkaforboð og rasuskilnaður. Og als ikki pláss fyri einari ungari, svartari listakvinnu, sum vildi nakað meira við lívinum, enn tað, sum henni var lutað til í dópsgávu í Guds útvalda landi.

Longu sum 12 ára gomul gavst hon í skúlanum, so hon kundi sleppa at dansa. 14 ára gomul ferðaðist hon runt í landinum við ymsum svørtum dansibólkum, og sum 17 ára gomul, í 1923, endaði hon í dreymabýnum New York, á sjálvum Broadway.

Men hon vildi ikki taka til takkar við at spæla »blackface«, sum var einasti leikluturin fyri litt og svørt fólk í USA. Rasuskilnaðurin, segregationin, loyvdi ikki svørtum at standa á palli. Bert um tey vóru málað svørt og parodieraðu »nekaran«, so áskoðararnir hildu, at tey vóru hvít í veruleikanum.

## Vann avantgarduna

So evnaríka dansarinnan leitaði sær út um landoddarnar og bergtók eftir ongari tíð mentanarháborgirnar París og Berlin. Har gjørdist hon skjótt miðdepilin í avantgardistiska listaumhvørvinum í seinnu helvt av 20'unum, serliga eftir víðagitna banandansin á Folies-Bergères í Paris.






*Josephine Baker, 1906-1975. Heimskend amerikonsk/ fronsk dansarinna, skemtari, sangarinna og mannarættinda-stríðskvinna*